# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Millumskúlaflokkur í 1959



Her er ein mynd frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er av 3. millumskúlaflokki skúlaárið 1959/60.

Aftast f.v.: Búgvi Joensen, Áki Mouritsen, Høgni Jacobsen, Símun av Skarði Ragnhild Mortensen og Unn Lützen.

Miðraðið f.v.: Knud Bjørk, Jóan Petur Midjord, Árni Olsen, Elin Mortensen, Elinbjørg Højgaard, Gunnvør Mortensen, Brynhild Sørensen og Lea Simonsen.

Fremst f.v.: Bjarni Rubek Nielsen, Betta Gilstón, Niels Nattestad, Turið Joensen, Martin Holm (lærari), Svanhild Sejer Hansen, Anna Suffía Rasmussen og Marsanna Holm.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 216)

*Myndaeigari: Helga Hentze Beyer*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá maður, pápi, abbi, langabbi og oldurabbi okkara

**Monrad Niclasen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.
Takk til starvsfólkið á Sambýlinum á Heygnum.
Takk til prest, kirkjutænarar og tykkum, ið bakaðu.
Ein serstøk takk til tykkum, ið hjálpti til við ervinum.
Takk fyri gávur til samkomuna Emmaus.
Hjartans takk til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Heilsan*
**Hervør**
**Bennrosa, Marjun, Mildrid og Rúni við familjum**

## Tøkk

Takk øll somul, sum á ein og annan hátt vístu samkenslu og hjálptu til í sambandi við deyða og jarðarferðina hjá

**Anders A. Andersen**

Takk til tykkum øll.

**Ragnhild, børnini, svigarbørnini, abba- og langabbabørnini**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, verfaðir og abbi

**Kurt Hansen**
Tórshavn

brádliga andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum fyri umsorgan og hollan stuðul. Til tey, ið stukku inn á gólvið og allar telefonuppringingar.
Tøkk til hjálparfólk í kapellinum, Hera prest fyri vælvald og troystarrík orð, til sangarar, kirkjutænarar og Kristiliga Sangkórið fyri vakran song.
Tøkk fyri blómur, heilsanir og gávur til Lions.
Eina stóra tøkk til tykkum, sum stóðu fyri og hjálptu til við ervinum.
Hjartans tøkk til tykkum øll, ið fylgdu Kurt til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Kirstin,**
**Ann og Lis**




## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, hjálpsemi og á ein og hvønn hátt hjálptu til, tá hjúnafelagi mín, mamma, omma og vermóðir

**Ruth Olsen**

doyði og varð jarðað.
Somuleiðis takka vit fyri kransar, blómur og heilsanir.

**Regin, Jákup, Annika og Armgarð**

**Dagurin**
**21. mai. Helena**, deyð ár 329. Hon var mamma Konstantin keisara. Grikst navn, ið merkir kyndil.